gult cyan magenta svart



## VIÐMERKINGAR

# Boomerangin endar aftur í Danmark

**Vagnur Michelsen**



Eitt dapurt politiskt skíggj hongur í løtuni yvir okkara vøkru oyggjum. Føroyingurin er í villareiði politiskt, og tú hevur eina kenslu av, at tað fara at ganga nógv ár, áðrenn vit veruliga fáa politiskan frið í Føroyum.

Føroyskir og danskir fjølmiðlar hava gjørt nógv burturúr politisku orrustuni seinastu vikurnar, og seinasta leygardag sendi Danmarks Radio í tríggjar tímar um føroysk viðurskifti. Eftir seinastu politisku orrustuna havi eg gjørt mær hesa niðurstøðu:

*1)* Tað eydnaðist í fyrsta umfari Poul Nyrup at seta føroyingar upp ímóti hvørjum øðrum. Men boomerangin, sum Nyrup kastaði við fyrstu samráðingar við føroyingar, fer fyrr ella seinni at koma aftur til Danmarkar. Danir fara einaferð at ásanna, at taktikkurin ímóti føroyingum var hin skeivi. Tú kanst ikki niðurbinda eitt fólk við hóttanum. Hava danir ikki lært av, tá ið Ísland varð lýst sjálvstøðug tjóð. Hví bleiv ísakalt landanna millum?

*2)* Leygarkvøldið fingu vit frá sjálvum Nyrup at vita, at millum annað natolondini USA, Stórabretland, Canada og Norra hava stóran áhuga í, at Føroyar eru í einum ríkisfelagsskapi, sum danir leiða.

So er staðfest, at Føroyar eru ein týdningarmikil geografiskur partur í Nato, sum natolondini fyri alt í verðini vilja hava í sínum parti.

Tí er tað ikki so løgið, at danir í nógv, nógv ár hava spart milliarda upphæddir í natolimaskapi, tí at ein natostøð er í Føroyum. Fullveldismálið fyri Nyrup er bert talan um pengar og makt. Talan er ikki um kærleika til vanliga føroyingin.

*3)* Sum ungur fekst tú mangan at vita, at Fólkaflokkurin var ógvuliga tjóðskaparligur í Norðoyggjum og í Eysturoynni, men tá ið tú komst suður um Kollafjørð og vart komin niðan í Hórisgøtu gjørdist flokkurin meiri og meiri sambandssinnaður.

Hetta fingu vit so dyggiliga staðfest í seinastu viku. Okkara tjóðskaparsinnaði løgmaður er rætt og slætt bukaður upp á pláss av teimum sambandssinnaðu fólkafloksmonnunum. Løgmaður er ímóti sínum egna vilja hamskiftur, tað sæst eisini so týðiliga á eygnabránum. Spell fyri henda annars so hampuliga, siðiliga og vælumtókta løgmann.

Tá ið hetta er sagt, er at fegnast um, at tjóðskaparsamgongan í skrivandi løtu heldur fram.

Eitt er tann politiski dysturin við danir, eitt annað er politikkurin heima í Føroyum.

Tað er ein øgiligur dynamikkur og positivur andi í føroyska samfelagnum í løtuni. Vit hava mestsum einki arbeiðsloysi og fólk flytur aftur til Føroya, bygt er nýtt vaktarskip og nýggj sandoyarferja, vit fyrireika nýtt suðuroyarskip, gera vágatunnil, útbyggja landssjúkrahúsið, hava loyst marknaðartrætuna við bretar, bankamálið varð loyst, pensjónin hjá teimum eldru er hækkað munandi og friður er í sjúkrahúsverkinum, oljuvinnan er í góðum hondum og búskapurin er sera góður í landinum. Bert at nevna nøkur av málunum, sum henda samgongan hevur avgreitt og fer at avgreiða.

Alt hetta er farið fram, meðan Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava verið í andstøðu. Og serliga hevur Javnaðarflokkurin grenjað, verið negativur og verið ímóti øllum, sum hevur rørt seg í landi okkara. Ja, sjálvt Jóannis Ejdesgaard mátti ransaka seg sálvan og ásanna í Sosialinum um ársskiftið, at hann hevði verið alt, alt ov negativur og mátti leggja á annan bógv.

Tí fái eg meg ikki at trúgva, at føroyingurin vil venda aftur til samgonguna frá 1994-1996 millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Ein sambandsflokk, sum fekk misálitisváttan í 1998 og ein Javnaðarflokk, sum rýmdi undan ábyrgd í 1996. Edmund Joensen og Jóannis Ejdesgaard vóru sum hundur og ketta, og tí endaði samarbeiði teirra millum 1996. Gloyma fólk veruliga so skjótt?

Sjálvandi hevur henda samgonga gjørt nøkur sjálvmál og nógv kundi verið gjørt øðrvísi. Men Rom bleiv ikki bygd eftir einum degi.

Annars skal Fólkaflokkurin vera fegin um, at einki nýval verður á hesum sinni, tí flokkurin hevði fingið ein dyggan undir vangan. Somikið hoyrist frá trúgvum fólkafloksveljarum í havnargøtum.

# Fjølmiðlarnir og fullveldið

**Albert Isfeld**
*100 Tórshavn*

Tað sær út til, at føroysku fjølmiðlarnir hava tikið støðu ímóti fullveldinum og taka heilt og fult undir við donsku niðurgerðingini av tí føroyska fólkinum saman við danskari pressu.

Amerikanski forsetin og nýskaparin Abraham Lincoln segði einaferð nakað soleiðis: »Tú kanst lúgva fyri einum parti av fólkinum alla tíðina og tú kanst lúgva fyri øllum fólkinum í eina tíð, men tú kanst ikki lúgva fyri øllum fólkinum alla tíðina«.

Lat hetta standa sum lærusetningur fyri teir føroysku fjølmiðlarnar.

Ta síðstu tíðina verður endurtikið upp í saman í útvarpi og sjónvarpi og í bløðunum, at vit hava fingið undirgrundina frá danskarum, ongin av hesum miðlum seta spurnartekin við útsagnið at vit hava »fingið undirgrundina frá danskarum«.

Eg leggi onki í at fara út í juridiskar ella stjórnmálafrøðiligar útgreiningar, tað duga Atli Dam og Halgir W. Poulsen nógv betur enn eg.

Vit hava búð í Føroyum í umleið 1200 ár og ongin hevur higartil, so vítt eg veit sett spurnartekin við, um vit eiga tann fiskin, sum vit fiska, ella teir seyðir vit fletta. Heldur ongin hevur, so vítt eg veit, takka danskarum fyri tey epli, sum verða velt í Føroyum. Bert ein persónur hevur higartil, so vítt eg veit, takka danskarum fyri eitt tilfeingi, sum vit heilt av okkum sjálvum eiga. Hetta hendi á einum føðingardegi há tí stóra kolonibestýraranum í 1992. Vit vóru fleiri, sum tá frøddust um, at tað endaliga var staðfest, at nú áttu vit sjálvi undirgrundina og harvið oljuna og mangt annað gott, sum møguliga finst í henni. Vit føldu takksemi yvirfyri okkara skapara, at endiliga sigraði rættvísi – í teimum umhvørvum eg ferðist í, hevði ongin hug at halda saman hendir og takka kolonivaldsharranum.

Eg veit væl, at tá ið onkur byrjar at jabba okkurt, er tendensurin ofta, at øll fara at jabba tað sama og tað ger heldur onki, tá ið jabbað verður um smávegis ting og hendingar og tá ið tann ið jabbar »bert« er Palleba ella Marsanna.

Men tað ger sanniliga ikki tað sama, tá ið tíðindafólk byrja at jabba. Teirra uppgáva er at bera okkum sonn, røtt og intelligent tíðindi, at útgreina hesi tíðindi fyri okkum lesarum og lurtarum á bestan hátt, hetta krevur bæði útbúgving, lesnað og almennvitan – tað nyttar onki her at skjóta seg undir ideologiskar ella partapolitiskar hugsjónir.

Heimføðisligheitin og Í fullveldismálum hava vit nú, síðan samráðingar við danskarar byrjaðu, hoyrt tíðindamann hjá Útvarpi Føroya sagt frá samráðingunum. Um hesin maður hevur útbúgving sum journalistur veit eg ikki og um sami maður ongantíð lesur útlendsk bløð, veit eg heldur ikki, men eitt veit eg, og tað er, at hesin maður útvarpssins ber donsk tíðindi til føroyingar.

Hvørt orð, tað verði seg skriva ella tosa, frá danskari síðu, verður endurgivið, sum um her er talan um høgan lærdóm og sannleika, ja man situr eftir við eini fatan av, at hesin maður stríðist mannliga fyri einari danskari sak og vil doyggja um so man vera.

Her meini eg og nógv við mær, at útvarpsstjórin eigur skyldu, at geva okkum lurtarum sakligan tíðindaflutning, eg meini ikki, at vit skulu jabba eftir munninum hjá Anfinni ella Høgna – vit krevja bert valuta fyri okkara útvarpsgjald.

undirbrotligheitin eigur ikki heima í Útvarpi Føroya.

Tað kann vera at føroyska tjóðin var ikki líka væl fyri í menning og lærdómi fyri umleið fimti árum síðani, sum tey londini vit sammeta okkum við. Tá var helst ringt at fáa fatur á væl útbúnum og royndum fólki – vit høvdu onga elitu ella intelligensia – tí var ofta hugt at hvat danskarar søgdu og skrivaðu. So er ikki longur, vit hava nú fólk við lærdómi og royndum innan at kalla øll øki, so tað er ikki neyðugt, hvørja ferð at lata danskarar koma framat microfonini, sum serfrøðingar innan øll øki. Vit duga eisini sjálvi (sjálvandi skulu vit fylgja við hvat hendir úti í heimi og um neyðugt, fáa fólk henda vegin at greiða frá v.m.).

Tað sum omanfyri er sagt um Útvarp Føroya, er á lag tað sama, sum kann sigast um Sjónvarp Føroya, bert við tí muninum, at sjónvarpi næstan ongi tíðindi ber.

Tað gleðiliga er hent við Dimmalætting, at hon nú er blað fyri allar føroyingar. Tað sama kann ikki sigast um Sosialin, her valdar miðaldarligt myrkur, tað er bara ein meining, sum er galdandi, ja sjálvt í karikaturtekningunum hjá Óla slær hesin hugburtur í gjøgnum. Hugsi tykkum til, um enski karkaturteknarin undir seinna heimsbardaga við heitinum Low, bert teknaði skemtitekningar av Churchill og ongar av mótstøðumanninum Hitler.

At enda kann eg nevna fúlu skrivingina hjá donsku bløðunum, síðan fullveldismálið byrjaði. Tað sær út til, at her er onki mark fyri fordómum og rasismu mótvegis føroyingum. Vit sum hava búð í Danmark kenna okkum ikki aftur, og serliga hugstoytt er, at føroysku fjølmiðlafólkini eru farin í song við fíggindanum.

P. S. Um tað er seriøsur tíðindaflutningur at siga, at danskarar hava »givið okkum undirgrundina«, so manglar kortini at siga okkum frá, nær og hvussu undirgrundin er vorðin donsk ogn.

# Berigtigelse af artikel i Sosialurin

**Karsten Loiborg**

Fra flere sider er jeg blevet gjort opmærksom på en artikel i dagens udgave af “Sosialurin” skrevet af John Johannessen, hvori det under overskriften “Helena kann fáa dóm” bl.a. anføres: “Upprit frá løgfrøðingi hjá Fólkatingsins Umboðsmannastovni mælir løgmanni til at fara viðari við málinum”. I fortsættelse heraf har jeg set at historien også findes på bladets hjemmeside, hvor det bl.a. anføres “Upprit løgfrøðingi hjá Fólkatingsins Umboðsmanna mælir løgmanni til at fara viðari við málinum”.

Disse udsagn ser jeg mig nødsaget til at korrigere. Jeg har uformelt på lagmandsdirektørens initiativ i telefonen drøftet nogle juridiske spørgsmål som har forbindelse med “pensjónsmálið”, men jeg har udtalt mig som privatperson, og ikke som ansat hos Folketingets Ombudsmand (som ingen kompetence har over for færøske myndigheder) - hvilket jeg også gjorde lagmandsdirektøren meget klart. Jeg har ikke “anbefalet” Lagmanden “at gå videre med sagen”, men har besvaret spørgsmål fra lagmandsdirektøren om hvad man ville have gjort i en tilsvarende sag i Danmark. Jeg har i denne forbindelse svaret at en helt tilsvarende sag mig bekendt ikke har foreligget, men i øvrigt peget på forskellige spørgsmål som jeg ville mene man i den givne situation nærmere ville undersøge og overveje.

Jeg blev i øvrigt først nogen tid efter telefonsamtalen med lagmandsdirektøren bekendt med at der var lavet et internt telefonnotat, og at dette var blevet videregivet til udenforstående, og jeg er først efter fremkomsten af artiklen i dagens udgave af “Sosialurin” blevet bekendt med telefonnotatets indhold.

Artiklen i dagens udgave af “Sosialurin” omtaler videre en (mulig) overtrædelse af § 5, stk. 2, i “lógini um ábyrgd landsstyrisins”. Jeg skal præcisere at jeg ikke har udtalt nogen opfattelse i relation til dette spørgsmål, men derimod generelt under samtalen flere gange gjorde opmærksom på at et juridisk ansvar for såvel embedsmænd som politikere ikke alene forudsætter at der objektivt er sket noget forkert, men at det også kan bevises at bestemte personer subjektivt kan tilregnes dette.

Jeg beder venligst om at såvel artiklen i “Sosialurin” den 13. marts 2001 som avisens hjemmeside berigtiges i overensstemmelse med ovenstående.



## ÚT AT KOYRA

# Væl vitjað evniskvøld á bildeildini á Tekniska Skúla




*Arne Thue Hansen frá Bosch í Danmark greiðir frá um nýggju umhvørvisvinaligu lógirnar, sum eru settar í gildi*

**Mikukvøldið 7. mars vóru eini 50 fólk savnað á bildeildini á Tekniska Skúla í Havn, har skipað varð fyri evniskvøldi fyri bilmekanikarar, har høvuðsevni var EOBD, ið er nýggja lógarkravda tøknin, sum allir nýggir bilar við bensinmotori skulu hava frá 1. januar í ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í lýsingini frá bildeildini stóð, at evniskvøldið skuldi snúgva seg um CARB - OBD - og EOBD. Fyri tey flestu søgdu hesir bókstavirnir ikki nógv, so spennandi var at fáa meira at vita um hesi evni. Fundurin byrjaði kl.19.00, har Eirikur Ó. Simonsen, lærari, beyð vælkomin og segði, hvat var á skránni fyri kvøldið, Síðani læt hann orðið til Arna Thue Hansen frá Bosch í Danmark. Hann greiddi frá, at orsakað av tí alsamt vaksandi dálkingini verða sera strong krøv sett til bilverksmiðjurnar og harvið eisini til tey, sum skulu umvæla bilarnar. Arbeiðið sum bilmekanikari er ómetaliga nógv broytt tey seinastu árini.

### Byrjaði í Kalifornia

Amerikanski staturin Kalifornia er kendur fyri sínar strongu lógir fyri dálkandi útstoytsgassi á bilum við bensinmotori. Fyri at minka um luftdálkingina, innførdu teir »California Air Resources Board« (CARB) í 1988 fyri at minka um útlátið á øllum akførum við bensinmotori í landinum. Harafturat innførdu teir »On Board Diagnose« (OBD), ið er ein elektronisk stýrd skipan, sum ansar eftir øllum komponentunum, sum hava við útlátið úr útstoytinum at gera. Fyri at gera tað møguligt hjá bilføraranum at varnast brek í OBD útlátskipanini, vórðu ávaringarljós sett í bilarnar. Í 1996 blivu krøvini til útlátið uppaftur strangari við OBD II, sum eisini bleiv innførd í Evropa sum Europeisk On Board Diagnose (EOBD).

### EOBD frá 1.januar

Fyri at verða góðkendir í Evropa skulu allir bilar við bensinmotori frá 1. januar í ár av lúka EOBD krøvini. Endamálið við EOBD er til dømis eitt støðugt eftirlit við øllum komponentum, sum kunna ávirka dálkingina úr útstoytinum, skráseting av brekum, sum hava við útstoytsgassið at gera, goymsla av upplýsingum um brek, sum koma fyri, og møguleikan fyri at avlesa goymd brek við diagnosuútgerð. Evropeiska nevndin fyri flutning, umhvørvið og ídnaðin hava saman við bila- og oljuídnaðinum, gjørt reglur um eina stigvísa minking av luftdálkingini.

### Praktiskar uppgávur

Eftir ein steðg við kaffi og køkum hetta kvøldið vórðu eisini gjørdar praktiskar uppgávur, har teir simuleraðu brek, leitaðu í skipanini, funnu brekini, rættaðu og strikaðu tey. Tað er nú einaferð soleiðis, at flest øll brek í skipanini hava við sær vandan fyri meiri dálking, tí er tað so neyðugt at brekini verða rættað beinanvegin.

Sum dømi um, hvussu nógv meira umhvørvisvinarligir bilarnir eru vorðnir í dag kann nevnast, at ein Ford Cortina frá 1977 dálkaði tað sama sum 50 Ford Mondeo frá í dag, og ein Mondeo frá í dag, dálkar tríggjar ferðir minni enn ein Mondeo frá 1993. Hetta man vera galdandi fyri tey flestu bilmerkini.



*Eirikur Ó. Simonsen, lærari, beyð vælkomin og segði, hvat var á skránni fyri kvøldið*



*Nógv fólk var komið saman á Tekniska Skúla hetta kvøldið, har ein stórur partur av bilstarvsgreinini var umboðaður*